# Tvítal av fornøvnum

Tá ið talan er um málførismunir í føroyskum, hugsa vit næstan altíð fyrst og fremst um munir í framburðinum. Men bygarmálsmunir eru eisini innan orðatilfeingið, bendingarskipanina og kanska eisini orðalagið.

Í sambandi við orðatilfeingið eru sjónskastu munirnir uttan iva persónsfornøvnunini í 1. og 2. persóni fleirtali. Meðan Føroyar annars hava *vit* og *tit*, hevur suðuroyarmál her *okur* og *tykur*. *Vit* og *tit* koma av norrønu tvítalsformunum *vit* og *it*, seinni *þit*, meðan *okur* og *tykur* koma av norrønu tvítalsformunum í hvønn- og hvørjumfalli *okr* og *ykr*, tað sum svarar til *okkum* og *tykkum* í føroyskum annars í dag; *okur* og *tykur* hava so troka upprunaligu hvørfalsformarnar burtur og eru komin í teirra stað.

Sum skilst av tí, sum er sagt her omanfyri, var í norrønum munur gjørdur millum tvítal og fleirtal av persónsfornøvnunum í 1. og 2. persóni. Í tvítali vóru fornøvnini sum nevnt *vit* og *þit*, sum svarar til nútíðarføroyskt *vit* og *tit*, og í fleirtali vóru teir *vér* og *þér* (upprunaliga *ér*), sum seinni bleiv til *vær* og *tær* í føroyskum. Vísti persónsfornavnið til tveir persónar, varð sostatt *vit* ella *þit* brúkt, meðan *vér* ella *þér* varð brúkt, um fornavnið vísti til tríggjar ella fleiri persónar. Norrønt *vit* kundi sostatt verið týtt til nútíðarføroyskt: *vit báðir*, *vit báðar* ella *vit bæði*, sum tað nú hóskaði til innihaldið, meðan norrønt *þit* kundi samsvarandi verðið týtt: *tit báðir*, *tit báðar* ella *tit bæði*. Munurin millum tvítal og fleirtal fataði tó bert um fornøvnini, t.v.s. at vanligu fleirtalsformarnir av sagnorðunum eisini vórðu brúktir um tvítal.

Munurin millum tvítal og fleirtal tykist at hava hildið sær eina longst í Føroyum, nærri tilskilað í Norðoyggjum og norðast í Eysturoynni. Sambært V.U. Hammershaimb verður munur framvegis gjørdur millum tvítal og fleirtal av persónsfornøvnunum í summum bygdum í hesum øki miðskeiðis í 19. øld. Annars var tað vanliga har norðuri, at *vær* og *tær* høvdu skúgvað *vit* og *tit* burtur, t.v.s. at *vær* og *tær* hava verið brúkt um bæði tvítal og fleirtal.

Um hesa tíðina hava vit sostatt, sbrt. V.U. Hammershaimb, havt eitt tríbýti í Føroyum, tá ið tað snýr seg um fleirtalsformarnar av persónsfornøvnunum í 1. og 2. persóni. Í miðøkinum hava vit havt *vit* og *tit*, í Suðuroy hava vit havt *okur* og *tykur*, og í Norðoyggjum og norðast í Eysturoynni hava vit havt *vær* og *tær*. Seinni hava so *vit* og *tit* sum kunnugt troka *vær* og *tær* burtur har norðuri, meðan suðuroyingar hava hildið fast við *okur* og *tykur*.

*Marius*



# Mátingar av sjálvljóðum í føroyskum

**Hjalmar P. Petersen**

## 1. Inngangur

Henda greinin byggir á mátingar, sum blivu gjørdar á heysti í 1997 av sjálvljóðunum í føroyskum í umhvørvinum: *eg sigi orðið d...t nú*. Telduforritið, sum var nýtt, var *Signalyze*. Talan er um formantkanningar. F1 í talvunum stendur fyri Formant #1, F2 og F3 fyri formant #2 og #3, har mann hevur F2 minus F3 á tí vatnrøttu ásini, meðan F1 er á tí lodrættu ásini.

### *1.1. Hvat er eitt sjálvljóð*

Hvat er eitt sjálvljóð? Sjálvt navnið sigur eitt sindur. Tað er eitt ljóð, sum kann standa sjálvt, tí *sjálv*ljóð. Tað, sum liggur í tí, at eitt sjálvljóð kann standa einsamalt, er, at tað einsamalt kann dána eitt stavilsi, eins og sæst í orðum sum *eg* [eː] og ein *á* [ɔɑː]. Her er einki hjáljóð, t.d. eitt *t*, aftur at sjálvljóðinum.

Sjálvljóð verða eisini greinað eftir, hvussu tey verða borin fram, t.e. at eingin treinging er nakrastaðni í munninum. Eingin larmur (el. friktión) hoyrist, tá eitt sjálvljóð verður borið fram. Hetta kemur greitt fram í t.d. muninum ímillum *jørð* og *ylur*, har eitt lítið sindur av friktión hoyrist í *jørð*. Tá mann ber fram eitt sjálvljóð, streymar luftin frí úr lungunum og allan vegin út.

Sjálvljóð verða greinað í einljóð og tvíljóð. Eitt einljóð stendur einsamalt í einum stavilsi eins og *e* í *her* [heːɹ]. Tvíljóð mugu hava eitt annað ljóð aftur at sær í sama stavilsi. *ei* og *ó* eru dømir um tvíljóð í føroyskum í orðum eins og *heitur* [haiːtʊɹ] og *stórur* [stɛuːɹʊɹ].

Tvíljóð í føroyskum kunnu enda við einum *i* (*feitur*) ella einum *u*-endaljóði (*stórur*). Hesi verða kallað rísandi tvíljóð, tí tann seinni parturin rísur ímóti einum *i* og einum *u*. Stavilsiskjarnin í hesum tvíljóðunum er tað ljóðið, sum stendur framman fyri *i* og *u*. Hini tvíljóðini (í *maður* og *hálur*) eru sveimandi tvíljóð, tí tað ikki ber til at siga, hvar stavilsiskjarnin er.

Sjálvljóð verða greinað eftir, hvar tey verða borin fram. Tey, sum eru borin fram har frammi í munninum, eru frammælt. Hesi eru *i*, *e* og *ø* í føroyskum. Um tey verða borin fram har afturi í munninum, eru tey bakmælt. *u* og *o* eru bakmælt sjálvljóð í føroyskum. *a* í *mann* er mest at rokna sum eitt miðmælt sjálvljóð.

Sjálvljóð verða eisini greinað eftir frástøðuni ímillum góman og tunguna, tá hendan liggur í hvílustøðu. *i* og *u* eru høg ella trong sjálvljóð í føroyskum, tí

Mynd 1

| | Frammælt | | Miðmælt | Bakmælt | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Órundað* | *Rundað* | | *Órundað* | *Rundað* |
| ***Trong*** | iː | | | | uː |
| ***Hálvtrong*** | eː | øː | | | oː |
| ***Opin*** | | | aː | | |

tungan er næstan ímóti gómanum, tá hesi ljóð verða borin fram. *e*, *ø* og *o* eru miðhøg ella hálvtrong sjálvljóð, meðan *a* í *hara* og *tomat* er eitt opið sjálvljóð. Neyðugt er við fleiri opningarstigum. Tað hoyrist í orðum eins og *hitt*, t.e. har eitt sjálvljóð stendur framman fyri tveimum ella fleiri hjáljóðum (t+t í *hitt* er dømi um tvey hjáljóð). Hetta ljóðið er ikki eins opið og *i* í *hin*. Tað er hálvtrongt, sbr. mynd 4 niðanfyri.

Verður hugt í spegil, sæst eisini, at munurin ímillum *e* og *ø* er, at tað fyrra er órundað el. ókringt, meðan tað seinna er rundað el. kringt, tí varrarnir eru rundaðir.

## 2. Formantar?

Hvussu fata vit t.d. eitt /iː/ sum eitt /iː/, og eitt /uː/ sum eitt /uː/? Grundin er hon, at eitt sjálvljóð er treytað av yvirtónabygnaðinum, tað hevur. Tað eru yvirhøvur tveir tónar (*en.* pitch) í einum sjálvljóði. Annar fer niðureftir í røðini [i, ɪ, e, ɛ, æ, ɑ, ɔ, o, ʊ, u][1], har [uː] er tann lægsti tónin. Hin fer uppeftir á teimum fyrstu fýra sjálvljóðunum í nevndu røð, og niður á hinum fýra. Hetta eru formantarnir hjá einum sjálvljóði. Tann lægri er formantur #1 (F1), hin #2 (F2). F3 er eisini til staðar, men ikki er møguligt at vísa, hvussu tónin í hesum formantinum er við bara at nýta oyrað.




Mynd 2



Tað, ið vit hava gjørt her, er at máta formantarnar og seta teir inn í eitt formantkort.

## 3. Sjálvljóðini í føroyskum

Sjálvljóð eru, eins og nevnt í innganginum: trong, hávtrong, hálvopin og opin. Hetta eru opningarstigini. Tey eru frammælt ella bakmælt og kunnu vera rundað ella órundað. Skipanin verður tískil henda í føroyskum:

(Orðadømir: *hin*, *hurð*, *her*, *hørð*, *hor*, *hara*). Hetta eru tey longu sjálvljóðini í føroyskum, og tað vísir seg, at uppsetingin omanfyri svarar væl til mátingarnar av sjálvljóðunum, eins og sæst í mynd 2.

Tann vanliga artikulatoriska greiningin av sjálvljóðunum, hon sum er sett upp í 1 omanfyri, er lík formantkanningunum, tí frekvensurin í F1 økist, sum farið er frá teimum trongu ljóðunum til tey opnu ljóðini, og hann minkar, sum farið verður frá einum opnum sjálvljóði til eitt trongt sjálvljóð. F1 er tískil øvutur av sjálvljóðahædd, sbr. Mynd 1, sum er ein artikulatorisk lýsing av sjálvljóðunum, og mynd 2, sum er ein spektografisk máting av sjálvljóðunum. Eisini sæst, at bakmæli er reflekterað í muninum ímillum F1 og F2, tí teir eru fjarir hvør frá øðrum í frammæltum sjálvljóðum, men nær í bakmæltum sjálvljóðum. Nakað sæst eisini til rundingina. Yvirhøvur er tað soleiðis, at frekvensurin í teimum høgu formantunum (F2 og F3) minkar, tá sjálvljóðini eru rund.

### *Lutfallið ímillum long og stutt sjálvljóð*

Hetta er kortini ikki øll skipanin. Ein munur er ímillum ljóðini, um tey standa framman fyri tveimum ella fleiri hjáljóðum, ella um tey bara standa framm-

| Skrift | Long Skriftmál | Ljóðskrift | Stytt Skriftmál | Ljóðskrift |
|---|---|---|---|---|
| (i) | hin | [iː] | hitt | [ɪ] |
| (y) | kykur | [iː] | kykt | [ɪ] |
| (u) | gulur | [uː] | gult | [ʊ] |
| (e) | frekur | [eː] | frekt | [ɛ] |
| (ø) | høgur | [øː] | høgt | [œ] |
| (o) | tola | [oː] | toldi | [ɔ] |
| (í) | tíma | [ʊiː] | tímdi | [ʊi] |
| (ý) | sýna | [ʊiː] | sýndi | [ʊi] |
| (ei) | heitur | [aiː] | heitt | [ai] |
| (ey) | deyður | [ɛiː] | deytt | [ɛ] |
| (oy) | loyna | [ɔiː] | loyndi | [ɔi] |
| (ú) | súrur | [ʉuː] | súrt | [ʏ] |
| (ó) | stórur | [ɛuː] | stórt | [œ] |
| (á) | hálur | [ɔɑː] | hált | [ɔ] |
| (a) | maður | [ɛaː] | mann | [a] |
| (æ) | fær | [ɛaː] | fært | [a] |

Talva 1

| MYND 3 | Frammælt | | Miðmælt | | Bakmælt | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Órundað* | *Rundað* | *Órundað* | *Rundað* | *Órundað* | *Rundað* |
| ***Trong*** | iː/ɪ | | | ʏ | | uː/ʊ |
| ***Hálvtrong*** | eː/ɛ | | | | | oː/ɔ |
| ***Hálvopin*** | | øː/œ | | | | |
| ***Opin*** | | | a | | ɑ | |

an fyri einum hjáljóði el. ongum hjáljóði. Hetta hoyrir tú alt fyri eitt, um tú bert fram orðapør eins og *frekur* og *frekt*. Í tí fyrra førinum er *e* eitt langt ljóð [eː], meðan tað er stutt ella stytt í tí seinna førinum [ɛ]. Hetta er, tí tað her stendur framman fyri tveimum ella fleiri hjáljóðum, t.e. *frekt*.

Hesin munur ímillum long og stytt sjálvljóð hoyrist, um fylgjandi orðapør verða borin fram, sí talvu 1, bls. 39.

Spurningurin er nú, hvussu lutfallið ímillum tey longu og tey stuttu sjálvljóðini fer at hátta sær í mátingunum.

Ta fatan, mann fær av teimum stuttu ljóðunum, er, at tey eru eitt sindur linari enn hini. Tey eru ikki eins spent og tey longu ljóðini. Tey fyrru kunnu vit nevna spent ljóð (*en.* tense), tey seinnu sløk ljóð (*en.* lax).

Skulu øll ljóðini, tey longu og tey styttu, setast inn í eitt skema, verður myndin hendan, sí mynd 3.

Eg havi sett tey sløku ljóðini saman við teimum spentu, sjálvt um tey eru lægri, sbr. mynd 4.

Hygg at sjálvljóðakortinum á mynd 4.




Mynd 4






Mynd 5

Her kemur greidliga fram, at tey stuttu ljóðini eru lægri (slakari) enn tey stuttu ljóðini. Sbr. her eisini Rischel, J. (1964)[2]

Tey styttu ljóðini einsamøll síggja soleiðis út, sí mynd 5.

### 3.2. Tvíljóð

Tvíljóð eru eitt samband ímillum tvey sjálvljóð eins og *e* og *i* í *reiður* og *e* og *u* í *róður*. Tvíljóðini í føroyskum eru hesi:

1. *Tvíljóð, sum enda við einum i-ljóði:* Legg merki til, at tað stutta avbrigdið av *ey* er eitt einljóð (sum í *deyður* ~ *deytt*)
   Formantarnir hjá hesum tvíljóðunum eru á mynd 6 bls. 42 (bara tey longu ljóðini)
2. *Tvíljóð, sum enda við einum u-ljóði:* Formantarnir hjá hesum tvíljóðunum

Tvíljóð, sum enda við einum *i*-ljóði:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skrift: | í, ý | ei | ey | oy | |
| Framburður: | [ʊɪː] | [aɪː] | [ɛɪː] | [ɔɪː] | (long) |
| | [ʊɪ] | [aɪ] | [ɛ] | [ɔɪ] | (stutt) |

Tvíljóð, sum enda við einum *u*-ljóði:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skrift: | ú | ó | |
| Framburður: | [ʉuː] | [ɛuː] | (long) |
| | [ʏ] | [œ] | (stutt) |

Sveimandi tvíljóð:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skrift: | á | a/æ | |
| Framburður: | [ɔɑː] | [ɛɑː] | (long) |
| | [ɔ] | [a] | (stutt) |




Mynd 6

eru á mynd 7.

*3. Sveimandi tvíljóð:*

Formantarnir hjá hesum tvíljóðunum eru á mynd 8.

Legg merki til, at tað fyrra sveimandi tvíljóðið er eins og eitt nú *ú* [ʉu], og tey flestu av hinum tvíljóðinum, soleiðis at skilja, at tað er tann seinni parturin av




Mynd 7






Mynd 8

tvíljóðinum, ið hvørvur, tá tey styttast, t.e. einljóðast. Hetta er ikki so í [ɛaː], har tað er tann fyrri parturin av tvíljóðinum, sum hvørvir.

Vert er at leggja merki til, at tað er ein vissur munur ímillum tann seinnan partin av hesum tvíljóðunum, nakað, ið eisini hoyrist, um orðið *hvalabátur* verður borið fram. Tann seinni parturin av *a/æ* er fremri (eitt meira miðmælt ljóð) enn tann seinni parturin av *á*, og tí verða hesi ljóð ljóðskrivað sum [ɛaː] *a/æ* og [ɔɑː], sbr. mynd 8.

1) Hetta er úr *A Course in Phonetics* hjá Ladefoged P. (1982) og verður monnum víst til hesa bók og nýggjar útgávur av somu bók, um áhugi er fyri at fáa meira at vita um slík heitir.

2) Rischel hevur langa grein í *Fróðskaparritum,* 13, 1964, bls. 99-113.